# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvør svevur í tímanum!

Vit marknaðarføra okkum við at veiða fisk úr heimsins reinasta havi. Vit brúka reinu og órørdu náttúruna í okkara marknaðarføring. Framstandandi politikarar okkara ferðast kring heimin og fortelja, at vit hava heimsins mest burðardyggu fiskiveiðu osfr.

Um sama mundið verða virki noydd at stongja, tí keypararnir nokta at keypa fiskin, tí hesin er ikki burðardyggur.

Hvussu hetta hongur saman mugu Gudarnir vita! Kann eitt svarið vera, at okkara myndugleikar hava ikki brúkt neyðugu orkuna og viljan til tess at fáa boðskapin um føroysku burðardygdina út til røttu móttakararnar!

Onkur vil helst siga, at tað er so lætt at geva tí almenna skyldina, tá tað leikar á hjá privata vinnulívinum. Í hesum førinum við hýsuni viga ákærurnar móti okkara Fiskimálaráð tungt skulu vit lurta eftir fakfólki, sum nettupp arbeiða við sølu av fiski. ÚF hevði áhugaverda samrøðu í gjár við sølumann og við eiðismann um støðuna, nú Norðís er latið aftur.

Eftir at hava virkað hýsu í mong ár og selt hana sum hádelikatessuvøru til so framstandandi keyparar sum Mark & Spentzer í Onglandi eru dyrnar nú bráddliga stongdar. ICES sigur, at føroyski hýsufiskiskapurin er ikki burðardyggur, og tí gevast keyparar at keypa føroyska hýsu.

Og tað almenna fær skyldina. Tí sambært keldunum hjá ÚF hevur okkara fiskivinnumyndugleiki snorksovið í tímanum, tá tað ráddi um at kunna myndugleikar og keyparar um veruliga støðuna í Føroyum. Hava okkara myndugleikar forsømt at fylgt við gongdini, har krøvini til burðadygga vøru eru vorðin nógv størri og hetta harvið eisini krevur eyka upplýsingarsinnsats frá tí almenna? Hava vit bara latið standa til fyri so bráddliga at vakna við kaldan dreym?

Vit skulu ikki gera okkum til dómarar, men okkurt kundi bent á, at tað eru almennu fiskiveiði- (og nú eisini uttanríkis-) myndugleikarnir, sum ikki hava havt fingurin á pulsinum og avlurtað signalini úr umheiminum. Er hetta bara enn ein Skálaberg gøla, sum vit her eru vitni til. At Fiskimálaráðið tekur tingini sum givin og als ikki samstarvar við vinnuna!

Fiskimálaráðharrin vísir ákærunum aftur og sigur, at upplýsingarskyldan liggur hjá seljaranum og vinnulívinum. Her má so sanniliga vera talan um bæði og. Tað er alt ov bíligt av Vestergaard at skáka sær undan í hesum máli. Eins og í Skálabergmálinum tykist tað sum, at vinnan og tað almenna ikki virka nóg væl saman. Hvussu skal ein einstakur seljari hava somu orku og vekt at fáa henda fyri Føroyar so týðandi boðskap fram sum okkara Fiskimálaráð! Kanadiska stjórnin heldur í besta imperialistiska stíli fram at reka klappjaktpolitikk móti einum pinkulandi við at nokta tess skipum atgongd til sínar havnir. Sjálvandi eiga føroyingar ikki at ganga undir so órímulig krøv og minka um veiðuna. Vit hava søgulig rættindi til veiðu í altjóða sjógvi. Her stuðla vit Fiskimálaráðnum fult út og halda, at løgmaður eigur at leggja seg út í málið og krevja avgerðina hjá kanadisku stjórnini fyri altjóða rætt.

**Sosialurin**

## Opið bræv til Mentamálaráðið um arbeiðið við at nýskipa miðnámsútbúgvingarnar

Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara (YF) hevur í 2009 vegna limir sínar roynt at komið á tal við Mentamálaráðið (MMR) viðvíkjandi arbeiðinum at endurskoða miðnámsútbúgvingarnar. Limir felagsins, sum hava arbeitt við námsætlanunum, hava milt sagt ikki verið nøgdir við samskiftið við MMR. Lærararnir í námsætlanarbólkunum kenna ikki teirra tekst aftur, tá teir fáa hann aftur frá MMR, og halda seg vera hildnar uttanfyri ávirkan, hóast boðini frá MMR av fyrstan tíð vóru, at umboð fyri lærarar á øllum økjum skuldu vera við í tilgongdini. YF limir hava gjørt vart við hesa ónøgd, men MMR svarar teimum ikki aftur. Tað mest kollveltandi í øllum endurskoðanararbeiðnum er tó broytingarnar í skúlaskipanunum, tær sonevndu breytirnar. Her eru hvørki nevndin í YF ella limir felagsins tiknir við í arbeiðið, og heldur ikki eru vit kunnað um, hvussu skúlarnir og harvið breytirnar fara at síggja út. Tað er trupult bara at koma í samband við MMR.

Tann 6. apríl 2009 sendi YF bræv til MMR, har felagið, umframt at gera vart við sjónarmið síni, bað um fund við MMR. Tað tók MMR knappliga seks mánaðir at geva felagnum svar. Tann 25. august 2009 varð umboð fyri felagið biðið um at koma á fund við MMR tann 1. september 2009. Her fekk felagið at vita, at MMR var samt við øllum teimum atfinningum, sum felagið var komið við, men at umstøðurnar vóru soleiðis, at arbeiðið ikki kundi gerast øðrvísi. Á sama fundi bjóðaðu umboðini fyri MMR nevndina í YF at koma á fund við umboð fyri MMR, sum skuldi kunna nevndina um arbeiðið at endurskoða miðnámsútbúgvingarnar. YF tók sjálvandi av tilboðnum og skeyt 5. september 2009 upp fyri MMR, at fundurin skuldi vera 2. oktober 2009. Hesaferð fekk YF ongantíð nakað svar frá MMR. Hetta er serliga undrunarvert, av tí at uppskotið var komið frá MMR. Tað eydnaðist kortini felagnum nakað fyri jól í 2009 at fáa avtalu við MMR um, at fólk haðani skuldu koma á aðalfundin hjá felagnum 23. januar 2010 at kunna limirnar um arbeiðið. Gleðin var kortini stokkut, tí 21. januar 2010 boðaði MMR frá, at tey kortini ikki kundu senda umboð til aðalfundin.

YF og limir felagsins hava púra mist álitið á MMR. Á aðalfundinum hjá YF tann 23. januar 2010 áløgdu limirnir nevndini at skriva eitt opið bræv til MMR. YF skal í hesum sambandi gera vart við, at hvørki felagið ella limirnir halda seg vera tiknar við uppá ráð viðvíkjandi hesum stóra arbeiði, sum hevur so stóran og grundleggjandi týdning fyri felagið og limir tess. Hvørki felagið ella limir felagsins eru kunnaðir um hetta stóra arbeiðið. Tað, sum felagið umvegis hevur frætt um ætlanirnar við nýskipanini vil felagið staðiliga mæla MMR frá at seta í verk. Tað, YF veit um, er ætlanin at seta í verk eina tronga breytaskipan, har knappliga helvtin skal vera felags fyri alt miðnámsskúlaøkið og bara umleið 10% valfrítt. Hetta fer at hava við sær, at fjølbroytni innan miðnámsskúlaøkið fer at hvørva, soleiðis at skúlar, sum eiga at hava heilt ymiskan samleika, t.d. studentaskúlin og fiskivinnuskúlin, koma at hava minni rúm fyri sínum serlærugreinum. Sæð í mun til serlærugreinarnar hjá teimum ymisku skúlunum fer hetta at merkja, at tað aloftast verður lægsti felagsnevnarin, sum verður valdur. Úrslitið verður ein minni fjølbroyttur skúli. Tann størsti trupulleikin við ætlanunum við eini trongari breytaskipan, har serliga tær fyri nógvar næmingar truplu náttúruvísindaligu lærugreinarnar fáa høga raðfesting, er tó, at tað verða alt ov fáar breytir at velja millum. Á øllum studentaskúlaøkinum verða t.d. einans tvær breytir at velja ímillum og valmøguleikarnir fáir. Tað fer við vissu at hava við sær, at tað verður ógvuliga trupult at fáa allar næmingarnar ígjøgnum skipanina. Hetta er í veruleikanum beinleiðis í stríð við ætlanirnar hjá landsstýrinum um, at øll skulu fáa eina miðnámsútbúgving. YF heldur, at hendan breytaskipanin við fáum valmøguleikum fer at vera til stóran skaða fyri miðnámsøkið.

Í samband við endurskoðanina av miðnámsútbúgvingunum eftirlýsir YF kjak og opinleika, sum eru treytir fyri, at góðskan verður sett í hásæti.

**Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.